# Togar í mótsættan rætning

**Pál Weihe, formaður í Fólkaheilsuráðnum, heldur tað hava eina óhepna ávirkan á børn og ung, um vaksnir leikarar, ið skulu vera fyrimyndin hjá teimum yngru, lýsa við rúsandi løgi**

Leo Poulsen

2011 er kosið at verða kostár, og tað er Fólkaheilsuráðið, ið stendur fyri ymsu tiltøkunum, tó saman við einari røð av felagsskapum og stovnum.

Formaður í Fólkaheilsuráðnum er Pál Weihe, og vit hava eisini vent okkum til hansara við spurninginum um at ítróttafeløg nýta rúsdrekkaframleiðarar sum lýsingarpartnarar.

– Nú kann eg ikki svara fyri alt ráðið, men spyr tú um mína meining, so haldi eg tað vera óheppi, tá ítróttafólk ganga runt við einum merki í búnum teirra, sum verður forbundið við øl. Tað er sera óheppi. Eg skal ikki siga, at tað er ólógligt, men í tí stríðnum at halda rúsdrekkanýtsluna niðri í okkara samfelag, har er tað óheppi, sigur Pál Weihe.

Hann heldur tað vera serliga óheppið, tá rúsdrekka, ítróttur og ungdómur verða blandað saman.

Samanhildið við seinna partin av grein fimm í stevnumiðunum hjá ÍSF, tykist ein sponsoravtala vera brot á samtyktina.

– Ja, tað kanst tú siga. Nú kemur eitt sindur ann upp á, um fólk forbinda Okkara við vatn ella sodavatn, so er tað nakað annað. Men sum eg skilji tað, er tað mest forbundið við øl, sigur Pál Weihe.

Og tað er júst hetta, sum hann heldur vera trupulleikan.

– Hvat leggja fólk í tað, tá tey síggja búmerkið hjá Okkara, síggja tey øl fyri sær, ella síggja tey vatn og sodavatn. Tað seinni nevnda er eingin trupulleiki fyri okkum, men tað seinna er, sigur Pál Weihe.

Trupulleikin gerst størri av, at eldru leikararnir skulu virka sum fyrimyndir fyri børn.

– Ja, tá blíur tað serliga óheppið, um eldru leikararnir bera lýsingar fyri øl. Vit gera jú eitt stórt arbeiði fyri at halda rúsdrekkanýtsluna millum ung niðri, vit gera kanningar, vit gera átøk í skúlum og aðrastaðnis, sigur Pál Weihe.

Hann vísir eisini á skipanina við einkarsøluni og teimum høgu prísunum sum tálmandi átøk.

– Hetta saman við atkomiligheit virkar alt tálmandi, men eitt dømi sum hetta togar jú í mótsættan rætning. Og tað virkar jú nýtslustimbrandi, serliga millum ung, sigur Pál Weihe.



*Eisini Pál Weihe heldur, at rúsdrekka og ítróttur er ein óheppin samanblanding*

## Stevnumið um rúsdrekka og ítrótt

1. Ítróttasamband Føroya, ÍSF, arbeiðir ímóti rúsevnanýtlsu í sambandi við ítrótt.
2. Børn og ung, sum íðka ítrótt, skulu trygt kunna koma til venjingar og kappingar í einum rúsfríum umhvørvi. Venjarar, leiðarar og ítróttafólk skulu vera ein góð fyrimynd fyri onnur børn og ung og eiga ikki at brúka rúsdrekka í hesum samstarvi.
3. Allir limir felagsins skulu kunnast um tey skaðaárin, sum rúsdrekka og onnur rúsevni hava á ítróttaavrikini, trygdina og felagsandan innan ítróttina.
4. Í størsta mun skal áskoðaramentanin vera trygg og familjuvinarlig. Í ítróttarfelagshølunum skulu galdandi lógir og reglur haldast.
5. Ítróttin skal hava ein tálmandi hugburð í samstarvinum við feløg og virki, sum hava týðandi part av virkseminum knýtt at rúsdrekka. Allar deildir í sambandinum skulu fylgja landsins lógum um rúsdrekka. Lýsingar á leikvøllum, í hallum, felagshølum og á ítróttabúnum skulu fylgja somu reglum.
   Tað er ikki loyvt ítróttafólki at nýta lýsingar frá virkjum ella feløgum, sum lýsa við rúsandi evnum, hóast hetta ikki er í stríð við galdandi lógir.
   Sersambondini og deildarsambondini hava ábyrgd at kunna øll feløg um rúsevnapolitikkin.
6. ÍSF skal í altjóða samstarvi eisini arbeiða við at fremja henda rúsevnapolitikk.

Samtykt av stjórn ÍSF 14. mai 1999.

# Einki beinleiðis ósamsvar

**Petur Elias Petersen, ÍSF-forseti, heldur ikki at orðingin: » Tað er ikki loyvt ítróttafólki at nýta lýsingar frá virkjum ella feløgum, sum lýsa við rúsandi evnum, hóast hetta ikki er í stríð við galdandi lógir«, er í stríð við sponsorsáttmála millum Okkara Bryggjarí og HB**



*Petur Elias Petersen, ÍSF-forseti, hevur eftir øllum at døma eina aðra tulking av stevnumiði fyri rúsdrekka og ítrótt enn mong onnur*

Leo Poulsen

Í sambandi við, at 2011 á stórari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum varð kostið at vera kostár, meldaði ÍSF seg undir flaggið við egnum ungdómsráðgeva og stórum ætlanum. Ætlanum væl at merkja, sum einki hevur verið at sæð til allan seinna part av vetrarhálvuni.

Hvar stendur ÍSF so, tá tað kemur til rúsdrekka og ítrótt.

– ÍSF samtykti 14. mai 1999 eitt stevnumið um rúsdrekka og ítrótt, og har eru nakrar greinar, sum vit vænta og vóna, at feløg og einstaklingar halda seg til. Hesar reglur ganga út upp á, at feløg og einstaklingar ikki skulu lýsa við beinleiðis framleiðslum av rúsdrekka frá virkjum, sum hava beinleiðis við rúsevni ella rúsdrekka at gera, sigur Petur Elias Petersen.

Hann sigur, at beinleiðis orsøkin til hesa reglugerðina er at finna í teirri tíðini fyri 12 árum síðani, tá framleiðslur sum Smirnoff Ice og Bacardy Breezer vóru ógvuliga væl umtóktar millum ung.

– Hetta saman við einum tálmandi hugburði viðvíkjandi rúsdrekka rundan um vøllin, har sum dystir verða leiktir, og har sum ungdómur hittist, sigur Petur Elias Petersen.

Hann viðgongur tó, at tað er rímiligt, at fólk seta Okkara í samband viðøl.

– Jú tað er rætt, Okkara øl er komið á marknaðin. Vit hava ikki endurskoðað okkara stevnumið, síðani tað varð samtykt, hinvegin, so sum eg síggi tað á heimasíðuni hjá HB, er tað ikki nøkur framleiðsla, ið lýst verður við, men bert heitið á virkinum, sigur Petur Elias Petersen.

Og tí heldur ÍSF forsetin ikki, at sponsoravtalan stríðir beinleiðis móti stevnumiðinum hjá ÍSF. Og hetta er ikki eitt mál fram um nakað annað, ið órógvar ÍSF-forsetan. Men.

– Sjálvandi eiga allar lógir og reglugerðir hjá ÍSF at verða endurskoðaðar við jøvnum millumbilum, og a tá nú hetta málið hevur stungið seg upp, og marknaðurin er broyttur, er tað helst nakað, vit eiga at hyggja nærri eftir. Antin gera nýggjar tulkingar, ella koma við einum nýggjum stevnumiði, sigur Petur Elias Petersen, ÍSF-forseti.